G! 16.-17. JULI FESTIVAL 2004

# Vit vildu hava góða lívið


*Kensluborna og reina røddin hjá Kasper Eistrup hugtók okkum á Gøtusandi*

**Danski rockbólkurin Kashmir livdi-ikki óvæntað-upp til sítt umdømi sum ein framúr livebólkur á Gøtusandi fríggjakvøldið. Serliga løgini frá fløguni The Good Life fingu okkum á gos**

KASHMIR Á G!
*Orð: Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Fuck they´re good. Kashmir hevur júst spælt frálíka lagið Graceland, og Gøtusandur kókar. Fremst við pallin hevur ein tyrilbani veittra við merkinum eina góða løtu. Tað er við at skýma á Gøtusandi og hárini reisa seg, tá eg hoyri reinu og kenslubornu røddina hjá Kasper Eistrup á næsta lagnum, Miss You.

Eftir eina heldur trilvandi byrjan er danski rockbólkurin og áhoyrararnir við at gerast heitir. Við mína vinstru lið hoyri eg onglendingar siga sína hugsan um framførsluna hjá Kashmir, og tað trýtir ikki við jaligum orðum.

Eg kann ikki annað enn smílast og innantanna játta samtykkjandi. Hetta er rætt og slætt ein framúrskarandi uppliving.

Kasper, Mads, Henrik og Asger fluttu okkum áhoyrarar inn í ein dreymaheim fríggjakvøldið, og at seta orð á ferðina er ómetaliga torført-ja næstan ómøguligt.

Á veg til Gøtu fríggjakvøldið leitaðu mínir tankar aftur á tíðina í triðja flokki í Kommunuskúlanum, tá tónleikakarrieran við eitt endaði, tá eg fekk fnatt av blokkfloytuni.

Við míni "glæsiligu" tónleikakarrieru í geyma havi eg fyri fleiri døgum síðan gjørt av, at eg fari bara at lurta á Gøtusandi, tí tað er fullkomiliga vitleyst, at eg skal seta meg sum dómara av fremsta rockbólkinum í Danmark seinastu árini.

Lat tað eisini vera sagt alt fyri eitt: Eg lurtaði allar 90 minuttirnar á tamb, og eg hungraði eftir meira, tá Kashmir um eitt-tíðina takkaði fyri seg.

### Promovera Zitilites

Tað er eitt gott ár síðan Kashmir lat sína nýggjastu fløgu Zitilites úr hondum. Nógv størsti parturin av løgunum, sum Kashmir framførdi á Gøtusandi fríggjakvøldið, vóru úr nýggjastu fløguni. Sum skilst hevur bólkurin seinastu mánaðirnar hildið fast í hesi somu skrá.

Tað var týðuligt at síggja, at áhoyrararnir á Gøtusandi høvdu størri tokka til løgini á fløguni The Good Life ið framvegis er nógv best umtókta fløgan hjá bólkinum. Hóast mær dámar væl nýggjastu fløguna hjá danska rockbólkinum, røkkir hon ikki somu hæddir sum meistaraverkið The Good Life.

Tað var tí eitt sindur spell, at Kashmir ikki spældu fleiri løg á hesari fløgu á Gøtusandi, tí tað vóru júst løgini á fløguni The Good Life, ið veruliga sparkaðu beinini undan okkum fríggjakvøldið.


*Kensluborna røddin hjá Kasper Eistrup er stóran part av tíðini guddómlig, og tú kennir tað nærmast, sum hann letir ein part av sál síni, tá hann flytir fram sínar persónligu tekstir*


*Tríggir fjórðingar av Kashmir f.v: Henrik Lindstrand, Kasper Eistrup og Mads Tunebjerg*

### Framúr livebólkur

– Vi mener selv, at vi er et godt liveband.

Í viðtalu við Sosialin fyri sløkum 14 døgum síðan vísti svenski limurin í Kashmir, Henrik Lindstrand á, at bólkurin leggur nógv fyri at fáa dygdina á live-framførslunum í topp. Dygdin á live-framførsluni á Gøtusandi var eisini tann parturin, ið bergtók meg mest við Kashmir.

Tað er hugvekjandi, hvussu væl danski rockbólkurin megnar fáa fram ta fjølbroyttu og stundum fløktu ljóðmyndina, ið eyðkennir løgini á seinastu fløgunum hjá bólkinum. Fleiri av løgunum fríggjakvøldið ljóðaðu væl betri live enn úr hátalarunum í stovuni, og tað lýsir væl, hvussu væl Kashmir eru samanspældir.

Kensluborna røddin hjá Kasper Eistrup er stóran part av tíðini guddómlig, og tú kennir tað nærmast, sum hann letir ein part av sál síni, tá hann flytir fram sínar persónligu tekstir.

### Onki gamalt

Persónliga kenni eg lítið til tær báðar fyrstu fløgurnar hjá Kashmir, ið bera heitið Travelogue og Cruzential.

Hjá siðbundu Kashmirfjepparum kennist tað óivað hugstoytt, at bólkurin ikki spældi nakað av gomlu løgunum á Gøtusandi. Bring Back The Superman á fløguni Cruzential var annars á skránni, men tíðin gjørdist ov knøpp at framføra lagið.


*Trýstið fremst við pallin varð so stórt, at fólk vóru biðin um at bakka nakrar metrar undir framførsluni hjá Kashmir*

## Heimsins besta Sodavatn




Sodavatnið frá Restorff er tað besta sum fæst í Føroyum. Millum annað tí at vatnið í Tórshavn er tað reinasta í landinum og ein fyrsta flokks rávøra bæði til sodavatn og øl.

Vit eru komnir í Ólavssøkuhýri, og frá ídag og til ólavssøku, bjóða vit frá útsølu okkara við Landavegin

**15 litur fyri Kr. 100,- plus pant**

Fritt val av sløgum og í 0,5 litur og 1,5 liturs fløskum

Børn elska okkara Restorffs sodavatn, tað er gott at sløkkja tostan við og sjálvandi sera gott at blanda sjussar við á Ólavssøku.

Okkara søla er vaksandi og okkum tørvar desperat tomar fløskur. Hjálpið okkum við tómum fløskum so vit kunnu hjálpa tyrstandi Restorffs vinum!

Restorffs BRYGGJARÍ